FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Fundarfrágreiðing frá stýrisfundi 26. februar 2014:**

**Dagur**: Mikudagur 26. februar 2014

**Fundarstaður**: KT- deildin, J.C. Svabos gøta 7

**Til staðar**: Herálvur Joensen, stýrisformaður, Jan Mortensen, næstformaður, Tove Bull, Juanna Joensen, Sára Joensen, Gestur Hovgaard, Vibeke Michaelsdóttir, stýrislimir, Sigurð í Jákupsstovu, rektari og Jørgen Meitilberg, fyrisitingarstjóri

Herálvur bjóðaði vælkomin

**Skrá:**

1. **Fíggjarstøðan/roknskapur 2013**

Roknskapurin fyri 2013 kemur at halda.

Roknskapartíðarskeiðið fyri fíggjarárið 2013 er ikki endaliga liðugt, men tað sær út til, at allar inntøkur og útreiðslur eru skrásettar í skipanini. Samlaða játtanin hjá Setrinum fyri fíggjarárið 2013 er 67.252 t.kr., og útreiðslurnar verða á leið 67.158 t.kr. – t.v.s. eitt avlop á 94 t.kr.

Játtanin til Setrið var 1,5 mió. kr. lægri fyri fíggjarárið 2013 í mun til fíggjarárið 2012, men Setrið hevur megnað at hildið seg innan fyri tillutaða játtanarkarmin. Høvuðsorsøkin til, at Setrið hevur megnað at hildið játtanina, er at spart hevur verið í rakstrinum, umframt at upphæddir frá inntøkufíggjaðum virksemi eru trektar inn í raksturin. Hetta eru inntøkur sum m.a. stava frá overhead av ymiskum verkætlanum og lønarendurgjald fyri starvsfólk.

2. **Fíggjarætlan og –støða 2014**

Rektarin legði fíggjarætlanina fyri 2014 fram, sí fylgiskjal 1.

Gongdin fyri standardkonto 11 og 14 árini 2009 til 2013 varð lýst í framløguni. Stýrið umrøddi, at ein neyvari lýsing av undirkonti fyri 11 og 14 er ynskilig, fyri á tann hátt at fáa meira útgreinað tøl fyri m.a. keyp av vørum og tænastum. Slíkar útgreiningar eru tøkar í leiðslukunningarskipanini, og kunnu tí lættliga setast upp.

Stýrið ynskti eisini, at fíggjarætlanin fyri 2014 verður sett saman við søguliga yvirlitinum. Við hesum fæst ein betri mynd av, hvussu fíggjarligar raðfestingar ávirka ymisku rakstarøkini. Umrøtt varð, hvørt ov lítið av peningi er settur av til rakstur. Undanfarin ár hevur verið avlop á lønarjáttanini, sum so hevur givið meira rásarúm til rakstur. Í tann mun at lønarjáttanin verður nýtt til fulnar, verður minni tøkt til rakstur. Heitt var tí á leiðsluna, um at ansa eftir, at javnvágin millum lønir og rakstur er hóskandi.

Stýrið ynskir eisini eina nærri lýsing av ávísum lyklatølum fyri raksturin. Ætlandi skal hetta gera tað einfaldari at fylgja við í, hvussu útreiðslur og inntøkur býta seg. Heitt varð á leiðsluna um at gera ein frymil fyri, hvussu tølini kunnu setast upp frá 2013 og frameftir.

Ásetingarnar í kunngerðini um próvtøku siga, at 2/3 av øllum próvtøkum skulu vera uttanhýsis. Hetta kostar Setrinum sera nógv. Í Noregi og Svøríki eru ásetingar til nøgdina av uttanhýsis próvtøkum als ikki so strangar, og als ikki tá tað ræður um lestur á BA-stigi. Leiðslan setir seg í samband við MMR fyri at kanna, um til ber at endurskoða ásetingarnar fyri uttanhýsis próvdøming. Hædd skal eisini takast fyri hesum í arbeiðinum við at dagføra útbúgvingarkunngerðina fyri Setrið.

## 3. Eftirmeting – status

Ein mánað eftir, at eftirmetingarpanelið vitjaði, lat panelið MMR ein lista yvir økir, sum tey ynskja meira kunning um, sí fylgiskjal 2. Talan er um eina røð av punktum, sum ætlandi skal geva panelinum breitt innlit í virksemið hjá Setrinum, og hvussu Setrið arbeiðir og samstarvar innan- og uttanhýsis. Elisabeth Holm og Randi Frederiksberg arbeiða saman við rektaranum við at savna og framleiða tilfar, sum panelið hevur ynskt. Arbeiðið verður skipað í samráð við MMR, sum tekur ímóti upplýsingunum og letur hetta til panelið. Tilfarið skal latast panelinum í seinasta lagi 31. mars í ár. Panelið vitjar Setrið í døgunum 12.-15. mai 2014.

Ásetingarnar í 2a) og 2b) í skjalinum frá panelinum eru viðkomandi fyri stýrið. Víðvíkjandi 2b) heldur stýrið tó ikki, at tað er neyðugt við serskildari strategi fyri stýrið. Í løtuni verður arbeitt við strategiskjali fyri Fróðskaparsetur Føroya, sí pkt. 5, og tað skjalið verður endaliga staðfest av stýrinum. Hetta eigur at verða nóg mikið og um neyðugt kunnu ásetingarnar í reglugerðini fyri stýrið brúkast.

## 4. Ársfrágreiðing 2012 – umrøða

Viðmerkt var, at onkrar greinar eru ikki komnar við í útgávulistan. Listin verður sendur út til viðmerkingar aftur.

Stýrið góðkendi frágreiðingina við smávegis rættingum. Tá rættingarnar eru gjørdar, verður frágreiðingin løgd út.

## 5. Strategiskjal – umrøða

Skjalið er meira heilstoypt nú enn á seinasta fundi. Skjalið er eisini meira yvirskipað og hevur ikki beinleiðis orðingar, sum taka støði í samfelagsstøðuni, sum hon er júst í dag. Leiðslan eigur at umhugsa at stytta skjalið nakað.

Stýrið tók undir við, at strategiskjalið verður sent til hoyringar á Setrinum.

## 6. Akademiska ráðið – staðfesting av reglum

Rektarin legði fram broytingarnar, sum eru gjørdar í valreglunum fyri akademiska ráðið eftir seinasta stýrisfund. Eitt, sum er komið aftrat í skjalið, er, at vísindaetiskir spurningar liggja hjá akademiska ráðnum.

Stýrið staðfesti skjalið.

## 7. Reglugerð fyri størv – uppskot til broytingar

Rektarin legði fram uppskot til broytingar til reglugerðina fyri størv á Fróðskaparsetrinum. Ein høvuðsbroyting er, at um umstøðurnar tala fyri tí, kann adjunkttíðin ásetast at vera upp til 6 ár. Og ásetingin "verður" settur í starv, verður broytt til "kann" verða settur í starv. Stýrið tók undir við, at leiðslan arbeiðir víðari við broytingunum.

Leiðslan ger eitt meira fullfíggjað uppskot til broytingar til næsta fund.

## 8. Kunning um upptøku 2014

Umsóknarfreistin fyri kvotu 2 er 15. mars, og freistin fyri kvotu 1 er 1. juli 2014

Hesar útbúgvingar verða bodnar út í 2014:

**BA útbúgvingar**

1. Lívfrøði
2. KT-verkfrøði
3. Lærari
4. Námsfrøði
5. Sjúkrarøktarfrøði
6. Sosialvísindi og samfelagsplanlegging
7. Politikkur og umsiting
8. Søga
9. Føroyskt

**MA útbúgvingar**

1. Løgfrøði
2. Føroyskt

Orka- og umhvørvisverkfrøði verður ikki boðin út í 2014, men ætlanin er at bjóða útbúgvingina út í 2015.

Í løtuni verður arbeitt við at umskipa útbúgvingina í lívfrøði, men arbeiðið er ikki liðugt enn. Tá útbúgvingin er umskipað, skal útbúgvingin marknaðarførast burturav, tí útbúgvingin er ikki dagførd í faldaranum "skapa teg á Setrinum".

## 9. Kunning um fjarlestur

Fróðskaparsetrið er farið undir eina royndarverkætlan innan fjarlestur á NÁD. Sp/f Videofundir samskipar samstarvið við Vakstrarætlanina á Sandi, bókasavnið í Runavík, Seglhúsið í Klaksvík og fjarlestrardepilin í Vági.

Í fyrsta umfari fevnir royndarætlanin um læraralesandi á fyrsta ári. Fyri tey lesandi merkir hetta, at tey ikki bara kunnu fylgja fyrilestrinum, men hava høvi at viðmerkja og spyrja, eins og sótu tey í auluni á Frælsinum. Til ber hjá lesandi at møta til undirvísing í Runavík, í Skálavík, í Klaksvík og í Vági.

Royndirnar við fjarlestrinum higartil hava verið sera góðar, hetta er galdandi bæði fyri lesandi og undirvísarar.

## 10. KT – kunning

Kunnað varð um, at allar deildir eru fluttar í hýsing á Føroya Tele.

Arbeitt verður við at útvega starvsfólkunum VPN atgongd, soleiðis at tey sleppa inn á skipanina heimanífrá.

Deildirnar uppliva framvegis teldutrupulleikar.

## 11. Landsgrannskoðanin, uppfylging frá seinasta fundi

Í 2013 og 2014 hevur Landsgrannskoðanin grannskoðað Setrið. Serliga tveir spurningar eru viðkomandi fyri stýrið:

- Menningarsáttmáli millum stýrið og MMR (ásett í reglugerð fyri Stýrið)
- Setrið var sjálvsognarstovnur fram til 2008, men nýggja lógin førdi við sær, at Setrið bleiv ein sjálvstøðugur almennur stovnur.

Stýrisformaðurin kannar, um avrikssáttmálin, sum er gjørdur millum stýrið og leiðslu, kann brúkast sum útgangsstøði til menningarsáttmála millum stýrið og MMR

Fyrisitingin á Setrinum tekur málið um sjálvsognar/almennan stovn upp við Mentamálaráðið.

## 12. Sjálvseftirmeting hjá stýrinum

Sum ásett í Reglugerð um virksemið hjá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya § 24 gjøgnumførdi stýrið eina sjálvseftirmeting av stýrisarbeiðinum. Til henda partin eru bara limir í stýrinum til staðar.

Stýrið viðgjørdi m.a. hesi evnini:

- Innanhýsis klima í stýrinum, samstarvsviðurskifti í stýrinum
- Studentaumboðanin í stýrinum og kenslan av at vera javnsettur partur av stýrisarbeiðinum
- Viðurskiftini millum stýrislimir valdir innan- og uttanseturs
- Viðurskifti við eigaran, t.e. Mentamálaráðið
- Viðurskifti millum stýrið og leiðsluna
- Fylgja vit strategiini upp?
- Fíggjarstýring
- Viðurskifti í s.v. stýrisfundir. Mál tit sakna ella mál, ið vit skulu halda eyga við? Mál, ið vit kunnu gera minni burturúr?

Niðurstøðurnar frá sjálvseftirmetingini verða m.a. nýttar sum skjal millum stýrið og rektaran um, hvørji fokusøkir stýrið heldur, at leiðslan eigur at leggja dent á komandi tíðina. Í stuttum heldur stýrið, at víðkað virksemi og støðugar broytingar hava sett Fróðskaparsetrið undir trýst, bæði hvat fíggjarliga og menniskjaliga tilfeinginum viðvíkir. Komandi tíðina eigur dentur tí serliga at verða lagdur á at styrkja innanhýsis mannagongdir og at menna felags fora av ymiskum slagi (Lestrarráð, Akademiska Ráðið umframt fyrisitingarlig fora), soleiðis at dagliga virksemið á Setrinum kann virka meira smidliga og trivnaðurin batna.

## 13. Ymiskt

### a. Setursdagar/professarafyrilestrar

Skipað verður fyri setursdegi á Námsvísindadeildini týsdagin 20. mai 2014. M.a. verður skipað fyri heldur professarasetanarfyrilestrum. Arbeitt verður við at gera endaliga skrá.

### b. Temadagar um sosialan kapital

Sum framhald av trivnaðarkanningini, sum varð gjørd í 2012, hevur Setrið hevur heitt á sálarfrøðingin Maritu Mortensen (Cand. Psych. Aut), at skipa fyri temadøgum á deildunum. MM hevur egið virkið, og arbeiðir við terapi og organisatiónsmenning. Temadagarnir byggja á hugtakið sosialan kapital.

Fyrst verður skipað við einum temadegi fyri hvørja deild, har samrøður verða hildnar um trivnað og arbeitt verður við at gera virkisætlanir.

Eftir temadagarnar á deildunum verður skipað fyri einum temadegi fyri leiðslu og samstarvsnevnd í felag.

Temadagarnir liggja soleiðis:

- 2. mai – SSS
- 5. mai – NÁD
- 6. mai – FMD
- 8. mai – NVD
- 9. mai – SFD
- 12. mai – SSD
- 19. mai – leiðsla og samstarvsnevnd
-

6,5 tímar eru settir av til hvønn temadag íroknað miðmála.

*Fyrisitingarstjórin*

Fylgiskjal 1

| Fíggjarætlan 2014 Fróðskaparsetur Føroya | 2014 J | 2014 Depil 1 SSS | 2014 Depil 2 HSN | 2014 Depil 3 NH | 2014 SUM | Munur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Nettoútreiðslujáttan | 71.752 | 17.056 | 34.200 | 20.350 | 71.606 | 146 |
| Útreiðslur | 76.952 | 17.256 | 38.900 | 20.650 | 76.806 | 146 |
| Inntøkur | 5.200 | 200 | 4.700 | 300 | 5.200 | 0 |
| **20 Fróðskaparsetur Føroya** | | | | | | |
| Nettoútreiðslur | 71.752 | 17.056 | 34.200 | 20.350 | 71.606 | 146 |
| **Útreiðslur** | **76.952** | **17.256** | **38.900** | **20.650** | **76.806** | **146** |
| 11 Lønir v.m. | 65.224 | 9.556 | 34.530 | 18.800 | 62.886 | 2.338 |
| 14 Keyp av vørum og tænastum | 8.000 | 4.200 | 3.870 | 1.750 | 9.820 | -1.820 |
| 15 Keyp av útbúnaði, netto | 1.100 | 500 | 500 | 100 | 1.100 | 0 |
| 16 Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.528 | 2.900 | 0 | 0 | 2.900 | -372 |
| 19 Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 52 Tilskot til einstaklingar | 100 | 100 | 0 | 0 | 100 | 0 |
| 54 Stuðul til annað virksemi | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 55 Íløgustuðul o.a. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 57 Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 61 Skattur og avgjøld | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 62 Kravd gjøld, bøtur o.a. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 63 Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 71 Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Inntøkur** | **5.200** | **200** | **4.700** | **300** | **5.200** | **0** |
| 21 Søla av vørum og tænastum | 1.500 | 200 | 1.000 | 300 | 1.500 | 0 |
| 76 Innanh. flyt. millum almennar stovn. | 2.200 | 0 | 2.200 | 0 | 2.200 | 0 |
| 77 Flyting frá kommunum til landið | 1.500 | 0 | 1.500 | 0 | 1.500 | 0 |

Fylgiskjal 2

- ***Ministeriet*** forsyner evalueringskomitéen med følgende:
- a) Lovgrundlag, bekendtgørelser og andre relevante regelsæt.
- b) Universitetets økonomiske grundlag og forudsætninger.
- c) Retningslinjer om ekstern censur, studiestøtte, studenterindflydelse mv.
- e) Eventuelle bestemmelser eller forudsætninger om ledelsesmæssige forhold.
- f) Beslutninger eller overvejelser om Bologna, akkreditering mv.
- g) Strategiske overvejelser og ønsker fra politisk hold.
- *2.* ***Universitetet*** forsyner med inddragelse af *fakulteter og afdelinger* evalueringskomitéen med følgende:
- a) Bestyrelsens rolle i forhold til økonomi, ledelse mv.
- b) Bestyrelsens strategi samt vision og mission
- c) Rektors rolle forhold til økonomi, ledelse, faglige valg med hensyn til forskning og uddannelse, kvalitetssikring mv.
- d) SWOT-analyse og universitetets fælles identitet
- e) Eventuelle samarbejdsaftaler samt konkrete samarbejder med andre institutioner på Færøerne om forskning, uddannelse, aftagerforhold, kontakt mv.
- f) Eventuelle samarbejdsaftaler på universitetsniveau med andre universiteter.
- g) Dekanernes og afdelingsledernes rolle i forhold til økonomi, ledelse, uddannelse, forskning mv.
- h) Relevant foreliggende statistik om optag, gennemførelse mv.
- *3.* Herudover indsamler ***universitetet*** oplysninger om:
- a) Adgangskrav til de enkelte uddannelser
- b) Bac, Master, enkeltfag, ph.d – fordeling, alder, køn, frafald, karakterer.
- c) Eksamensformer, bedømmelse, praktik, overordnet undervisningsplan
- d) Antal studerende, lærere, administrativ stab, undervisningsforpligtelser samt forpligtelser m.h.t. forskning og administration
- e) Kønsfordeling for ansatte som professor, lektor og adjunkt
- f) Forskningsbaseret undervisning, aftagerkontakt, undervisningsformer, herunder blended learning og fjernundervisning
- g) Undervisningsevaluering, studenterinvolvering, studievejledning
- h) de studerendes oplevelse af karrieremuligheder
- i) Væsentlige forskningsresultater, publikationer og synliggørelse, herunder formidling
- j) De ansattes opfattelse af universitetet som arbejdsplads, herunder udviklings- og karrieremuligheder

- k) Samarbejde med andre afdelinger/fakulteter om uddannelse og/eller forskning, hvilken rolle spiller kulturforskelle?
- l) Samarbejde med andre institutioner/virksomheder på Færøerne
- m) Samarbejde med andre universiteter
- n) Fakulteternes SWOT-analyse